## Claus hugsar um at gevast

Claus Bech Jørgensen og Blackpool góvust við at samstarva í summar. Eftir hetta var hevur hann í stytri skiftum roynt seg bæði í Port Vale og Fleetwood Town, umframt at hava royndarvant við danska felagnum AC Horsens. Teir báðar seinastu mánaðirnar hevur Claus Bech Jørgensen vant við Cheltenham í League Two í Onglandi, men sáttmáli spurdist heldur ikki burtur úr hesum. - Í løtuni liggur alt stilt, men ein umboðsmaður arbeiðir fyri meg. Hann hevur tosað við fleiri feløg, og áhugin hevur verið har. Men støðan er óvanlig, tí hóast afturmeldingarnar frá feløgunum eru góðar, so eru pengarnir ikki til staðar, umframt at fleiri feløg ikki hava pláss fyri fleiri leikarum í hópinum, sigur Claus Bech Jørgensen við bold.dk. a



## Mancini miðar høgt

Hóast Roberto Mancini longu hevur tapt eins nógvar dystir í Premier League sum Mark Hughes, so er núverandi Manchester City venjarin vísur í at røkka einum topp fýra plássi í Premier League. Tá Manchester City í vikuskiftinum tapti fyri Hull City, var tað tap nummar tvey hjá Roberto Mancini sum venjari hjá Manchester City, men tað tekur ikki mótið frá Mancini. Mancini sigur at hóast fleiri skaðar hevur liðið spælt væl, og hann vónar at fáa fleiri av spælararinum klárar aftur skjótt. Tað fer at gera góðan mun í royndini at røkka málinum. Hann vantar at kappingin fer at standa millum Arsenal, Liverpool, Tottenham, Aston Villa og teir sjálvar um triðja og fjórða plássi. Manchester City eru trý stig aftanfyri Liverpool, sum er á fjórða plássinum, men hava spælt tveir dystir minni.

# Alt kann henda

**Tríggir flogbóltsdystir verða spældir í Eik-liguni hjá kvinnum í annaðkvøld, og har kann tað gerast sera spennandi, tí toppurin kann bæði víðkast og tódna**



**Hilmar Jan Hansen**

Hóast fá munnu ivast í, at SÍ verður annað liðið í FM-finalunum hjá kvinnunum, so er enn hørð kapping um hitt finaluplássið. Umføri fækka, og nú hava summi lið fýra og onnur fimm dystir eftir, áðrenn greitt er, hvussu finalurnar eru mannaðar og hvør flytur niður.

Sum støðan er í løtuni, hava TB og Mjølnir ein lítlan fyrimun fram um Drátt, sum eisini er við har frammi, tí tey bæði feløgini hava spælt ein dyst minni. Men allíkavæl er sera tætt millum tey fremstu, og sum tað sær út í løtuni, kann í veruleikanum alt henda.

Í annaðkvøld verða tríggir dystir, og alt eftir úrslitunum, kann støðan bæði gera meira og minni spennandi. Kombinatiónsmøguleikarnir eru nógvir, men tað kann gerast alt frá, at eitt av teimum trimum fer eitt sindur frá hinum ella at tvey gera tað, og eisini er møguligt, at øll trý trunka seg saman, so bara eitt stig er millum nummar tvey og fýra.



Tvey av trimum teimum fremstu liðunum í Eik-liguni hjá kvinnum møtast í Sørvági í annaðkvøld, tá SÍ tekur ímóti Mjølnir

Mynd: Hilmar Jan Hansen

### Tveir torførir dystir

SÍ, sum alt kappingarárið hevur verið oddalið, tekur í Sørvági ímóti Mjølnir, sum fyri tað nógva hevur verið næstfremst, men síðstu tíðina hevur fingið harða kapping frá TB. Á heimavøllinum í Sørvági hevur eingin veruliga fingið gjørt nakað við SÍ, sum bara hevur tapt tann eina dystin, ið var á útivølli ímóti TB. Men trýstið liggur á Mjølnir, sum óivað fer at gera sítt besta, tí tvey óvæntað stig kunnu vera nógv verd, nú endaspurturin er farin í gongd.

Í Trongisvági tekur TB ímóti Fleyr, sum hevur havt eitt sera svingandi og vánaligt kappingarár, har úrslitini slett ikki hava staðið mát við vónirnar. Fleyr er meira ella minni á einum síðuspori og darlar aftanfyri, nú hini meira beinleiðis kappast um at koma í FM-finalurnar. TB má tí roknast sum favorittur, men skal helst spæla væl, skal tað eydnast at basa Fleyr, ið fyrr ella seinni kann koma fyri seg.

Triði dysturin verður á Giljanesi, har Dráttur tekur ímóti ÍF, sum er næstniðast og bara hevur tvey stig. Tí má sigast, at av teimum trimum liðunum, ið kappast um næstfremsta plássið, hevur Dráttur tann lættasta dystin í annaðkvøld og má roknast sum favorittur. Spurningurin er tí helst minst líka nógv, hvat hendir í hinum báðum dystunum, tí tey úrslitini kunnu hjálpa Drátti heilt fram ígjøgnum.

## Endurskoða flogbóltsreglur

Flogbóltssambandið er farið í hold við at viðgera leikreglur fyri bæði yngru og eldru deildirnar, og í hesum sambandi er áheitan send feløgunum um at velja eitt umboð í ein bólk, sum til aðalfundin í apríl skal endurskoða leikreglurnar.

Støða er enn ikki tikin til, um leikreglurnar hjá teimum yngru og teimum eldru skulu endurskoðast undir einum ella hvør sær, men tað er millum annað hetta, ið breiði arbeiðsbólkurin skal viðgera og gera sínar viðmerkingar til.

Jákup Fjallsbak hevur gjørt uppskot um, hvussu reglurnar fyri vaksnamannadeildirnar og barnaflogbóltin kunnu síggja út, og Flogbóltssambandið hevur eisini heitt á hann um at vera við í arbeiðinum.

Málið er í fyrsta umfari, at bólkurin skal kunna leggja eitt liðugt uppskot um leikreglurnar fyri aðalfundin, sum verður í apríl. Ein av nevndarlimunum í Flogbóltssambandinum fer saman við skrivaranum at samskipa arbeiðið.

**hil**

# Fleyr má vinna

**Í Eik-liguni hjá monnum verður kanska avgjørt í annaðkvøld, hvørji tvey lið koma í FM-finalurnar. Um Fleyr ikki vinnur, missir liðið sín finalumøguleika**



**Hilmar Jan Hansen**

Nú kappingin í Eik-liguni hjá monnum nærkast endanum, er stórt sæð bara eftir at finna útav, hvørji tvey av trimum møguligum liðum kunnu koma í FM-finalurnar. Har stendur kappingin fyrst og fremst millum Mjølnir og SÍ, sum eru næstan jøvn, meðan Fleyr er seks stig aftan fyri SÍ.

Tá dysturin í Sørvági í annaðkvøld millum SÍ og Fleyr er spældur, eru bara tríggir dystir eftir at spæla, og tí er kravið hjá Fleyr, at liðið vinnur í annaðkvøld, skal finalumøguleikin framvegis haldast á lívi. Vinnur Fleyr, minkar munurin upp til SÍ niður í fýra stig, so tá er framvegis teoretiski møguleikin at fara eftir, so leingi seks stig eru eftir at spæla um.

Men vinnur SÍ, so merkir tað samstundis, at sigast kann við fullari vissu, at FM-finalistarnir verða Mjølnir og SÍ. Teir írestandi dystirnir koma tá bara at hava týdning fyri, hvat av teimum báðum endar fremst í landskappingini, tí tað fremra fær rætt til heimavøll í einum møguligum triðja finaludysti.

Fleyr hevur í allan vetur verið tað minst støðuga av teimum trimum fremstu, og haraftrat má sigast, at eydnan heldur ikki hevur verið við. Tilsamans er tað fimm ferðir blivið til fimmsettarar ímóti Mjølnir og SÍ, og bara ein av teimum hevur Fleyr vunnið. Hann var júst ímóti SÍ í Sørvági, so tað kanska gevur Fleyr eitt sindur av trúgv upp á tað undan dystinum í annaðkvøld.



Høgni Viderø, Sune Juul Pedersen og hinir í Fleyr spæla fyri sínum seinasta møguleika, tá teir í annaðkvøld møta SÍ í Sørvági

Mynd: Hilmar Jan Hansen

## Dystir mikukvøldið

**Flogbóltur**

**Eik-ligan, kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 10/02 | 18.30 | SÍ-Mjølnir |
| 10/02 | 19.00 | Dráttur-ÍF |
| 10/02 | 19.30 | TB-Fleyr |

**Eik-ligan, menn**

| | | |
|---|---|---|
| 10/02 | 20.30 | SÍ-Fleyr |